TOP 15

SELDAR FLØGUR * hesa vikuna *

1. BON JOVI / Cross-road (1) 2. vika
2. CINDY LAUPER 12 Deadly Sins (2) 2. vika
3. AEROSMITH Big Ones (4) 2. vika
4. YMISK / Absolute Music 6 (8) 2. vika
5. JOHN LENNON The Collection (6) 2. vika
6. YMISK / Let's Dance 6 Nýggj 1. vika
7. YMISK / Absolute Music 5 Nýggj 1. vika
8. SMOKIE / Celebration (14) 2. vika
9. SHU-BI-DUA / Liv og glade dage (11) 2. vika
10. MARIA CAREY Merry Christmas Nýggj 1. vika
11. YMISK / Mega Mix 2 (9) 1. vika
12. YMISK / Mega Mix 1 Nýggj 1. vika
13. YMISK / Now 27 (15) 2. vika
14. PATO BANTON Baby Come Back Nýggj (Maxi) 2. vika
15. WANDROSS/CAREY Endless Love Nýggj (Maxi) 2. vika

SINGLE TOP 15

* í Danmark *

1. REDNEX / Cotton eye Joe
2. REDNEX / Old pop in an Oak
3. WHAM / Last Christmas
4. BON JOVI / Always
5. MO-DO / Ein Twei Polizei
6. WHIGFIELD / Saturday Night
7. E. TYOE / This Is The Way
8. CINDY LAUPER Girls Just Want To Have Fun
9. MICHELLE GAYLE Sweetness
10. BOYS II MEN / I'll Make Love To You
11. DISKOFIL / Hvor Skal Vi Sove I Nat
12. WHIGFIELD / Another Day
13. JUNGLEDYRET Diverse
14. NAZARET / Love Hurts
15. MADONNA / Secret


Vika 49, kelda: F. C. Búðin

NÝGGJAR FLØGUR



MARIAH CAREY
Merry Christmas
Warner Music

Tað er sjálvsagt einki nýskapandi við hesi fløgu, uttan at Mariah Carey syngur løgini. Men røddin hjá hesi framúrskarandi songkvinnu gevur gomlum slagarum sum Silent Night nýtt lív, og væl sungin, tað eru løgini uttan iva. Fimm stjørnur til røddina hjá Mariah Carey. – Soleiðis!




THE BEATMAS
XMAS
(Kick Music)

Við jøvnum millumbilum fáa danir okkurt skemtiligt hugskot, og hetta er ivaleyst eitt av teimum. Fløgan rúmar 12 kend jólaløg, ið øll relatera til eitt ávist Beatles lag. Vørumerkið hjá plátufelagnum er eitt hálvetið súrepli (tó ikki Grandy Smith sum hjá Beatlunum). Ljóðgóðskan er sum ein gomul The Beatles pláta, men tríggjar stjørnur fyri originalitet.



Pearl Jam
vitalogy
Epic

Síðan Pearl Jam seinast útgóvu fløgu, hava viðhaldsfólk teirra bíðað sera spent eftir næstu fløguni, og her er hon, VITALOGI. Sera fjølbroyttur rock tónleikur. Pearl Jam eksperimenterar sum Beatles, og provokera tað sum Led Zeppelin og Deep Purple, tó í 90'ara útgávu. Ein sonn frøi til teir lurtarar, sum longu hava fingið oyruni upp fyri Pearl Jam, og møguliga ein introduktión til onnur



80'ara SAMLING
Just can't get enough
(EMI)

Ein áhugaverd kollektión av 80'ara hittum. Stuttligt er aftur at hoyra bólkar sum »Depeche Mode«, »Soft Cell«, »Wham« og tílíkar, sum ein næstan hevði gloymt vóru til. Tað besta av øllum er, at fløgan er dupult, men verður seld fyri prísin av einari.

Fløgutíðindi

Nú jólasølan er byrjað, bæði innan- og uttanlands, eru hópin av nýggjum jólafløgum komnar á marknaðin. Eisini eldri jólaløg gera um seg ymsa staðni. Eitt nú kann nevnast, at á danska Top 15 listanum yvir seldar maxi-singlir eru teir navnframu Bon Jovi kroystir niður á eitt fjórða pláss. Lagið, ið er nr. 3 hesa vik-una, er onki minni enn Last Christmas við bólkinum Wham, ið er eitt afturvendandi »hit« á hvørjum ári. (Sí annars lista aðra staðni á hesi síðu).

Millum nýggjar jólafløgur kunnu nevnast: Mariah Carey og »Merry Christmas«, »XMMAS« við Beatmas (báðar umrøddar í blaðnum í dag), »Glamour Christmas« við ymsum kendum amerikumonnum, og »If every Day was like Christmas«, ið er ein endurútgáva av gomlum jólaløgum við Elvis Presley, ið hevði fylt 60 ár fyrst í nýggja árinum.

So eisini á fløgumarknaðinum skuldi verið hópin av góðum jólagávutilboðum.

Bon Jovi og Cindy Lauper

Nú jólamánaðin er hálvrunnin, er ongin ivi um hvør selir best í Føroyum í løtuni. Á einum klárum fyrsta plássi liggur fløgan »Crossroad« hjá Bon Jovi. Um bólkurin veruliga er komin á eitt tónleikaligt vegamót, kann lesarin sjálvur avgera. Sum klárt nr. tvey liggur Cindy Lauper, og talan er eisini her um eina uppsamling. Sum outsidari á einum triðja plássi er bólkurin Aerosmith við teirra »Big Ones«, ið føroyingar sum heild hava tikið stak væl ímóti.

fj

Statens Luftfartsvæsen
Vága Floghavn
SLV

Høli til leigu

Í farstøðini í Vága Floghavn er hølið, har Flykran er, til leigu. Hølið er 21,3 m² til støddar.

Skrivlig umsókn skal vera Statens Luftfartsvæsen, Vága Floghavn, FR-380 Sørvágur í hendi **í seinasta lagi 29. desember 1994.**

F.C. BÚÐIN
Undir Tórs-Cafeteria
Inngongd við gos-vatnið

VIDEOLISTIN:
(Allir við donskum teksti)

	KR.
1. Jurassic Park	239,-
2. De nådeløse	198,-
3. Pelikan notatet	259,-
4. Mrs. Doubtfire	259,-
5. Flygtningen	259,-
6. Åndernes Hus	259,-
7. A Perfect World	259,-
8. Tombstone	259,-
9. Resten af dagen	259,-
10. The Firm	259,-

GÓÐ JÓLAGÁVA
Ring – Vit senda!

Postboks 1250
FR 110 Tórshavn
Tlf. 17646 - Fax. 18401

Opið er:
Mánad.–hósd. kl. 10–17.30
Friggjadag kl. 10–19.00
Leygardag kl. 11–14.00

